# Toppskjúttin hevur sjáldan verið á meistaraliðnum

**Seinastu tíggju árini er tað bara eina ferð komið fyri, at besti málskjúttin í landskappingini hevur verið á liðnum, sum hevur vunnið FM**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Besti málskjúttin í farna kappingarárinum var Helgi Lamhauge Petersen. Helgi skoraði nítjan mál fyri silvurvinnararnar í GÍ. Í kvøld – tá gylti skógvurin verður handaður honum – verður tað síðsta ferðin, at Helgi fer at umboða GÍ – í hesum umfarinum í hvussu so er. Komandi kappingarár fer hann at spæla við NSÍ.

Árið í ár var tíggjunda kappingarárið, síðani føroysk feløg fyrstu ferð spældu við í Europa Cup. Tá føroysk feløg fóru at taka lut í europeisku kappingunum, varð alt meiri gjørt fyri at hava skil á hagtølunum, m. a. hvør skoraði málini í einstøku dystunum og harvið eisini hvussu máltindurin sá út.

Á onkrum av fótbóltsheimasíðunum eru yvirlit yvir dystir og úrslit nógv longri aftur, og t. d. á heimasíðuni hjá B68 sæst hvør hevur skorað málini.

## Sjáldan meistari

Í fótbóltsárbókunum, sum eru komnar síðani 1992, eru fullfíggjað yvirlit, sum vísa allar málskorarnar í øllum dystunum, og harvið er máltindurin eisini fullfíggjaður.

Merkisvert er tað, at hesi seinastu tíggju árini er tað bara eina ferð komið fyri, at besti málskjúttin hevur umboðað tað liðið, sum vann FM heitið. Tað var í 1994. Gí var meistari annað árið á rað, og fyrsta árið, hann spældi við GÍ, var John Petersen toppskjútti. Øll hini árini hevur besti málskjúttin spælt við øðrum liðum enn meistaraliðnum.

## Drúgvir

Sjey ymiskir spælarar hava verið toppskjúttar tey seinastu tíggju árini. Tríggir hava verið toppskjúttar tvær ferðir – Uni Arge, Jákup á Borg, og Súni Fríði Johannesen – og bara Jákup á Borg hevur verið toppskjútti tvey ár á rað.


Helgi L. Petersen var besti máskjúttin í landskappingini í fótbólti. Leygarkvøldið verður hann heiðraður fyr hetta

Tað er stórur munur á, hvussu mong mál toppskjúttarnir hava skorað tey ymisku árini. Lægsta talið var í 1993, tá Uni Arge var besti málskjúttin við ellivu málum. Men Uni Arge var so nógv bestur, tí Torbjørn Jensen hjá B71 skoraði næstflest – átta mál!

Uni Arge er eisini annar av tveimum, sum hevur skorað flest mál í hesum tíggju ára skeiðnum. HB álopsmaðurin skoraði 24 ferðir í 1997, tá HB fekk silvurmerkini, og B36 vann gull. Hetta var sama talið, sum Súni Fríði Johannesen rakk í 1995, tá B68 fekk bronsukrónurnar, og HB fekk silvur – hesa ferð aftanfyri GÍ. Tað ber ikki til at siga annað, enn at toppskjúttarnir tíggju tey seinastu árini hava verið rættuliga drúgvir í fremstu røð. Símun Petur Justinussen, sum var toppskjútti í 1992, er tann einasti av teimum, sum ikki hevur verið í 1. deild í ár, men hann tænti fyri seg í bestu deildini. Frá tí at GÍ kom í 1. deild í 1980 og fram til 1999, tá hann spældi við í fimm landskappingardystum, var Símun Petur Justinussen við í fremstu røð.

## Toppskjúttar 1992–2001

| Ár | FM | Spælari | Felag | Mál |
|---|---|---|---|---|
| 1992 | B68 | Símun P. Justinussen | GÍ | 14 |
| 1993 | GÍ | Uni Arge | HB | 11 |
| 1994 | GÍ | John Petersen | GÍ | 21 |
| 1995 | GÍ | Súni Fríði Johannesen | B68 | 24 |
| 1996 | GÍ | Kurt Mørkøre | KÍ | 20 |
| 1997 | B36 | Uni Arge | HB | 24 |
| 1998 | HB | Jákup á Borg | B36 | 20 |
| 1999 | KÍ | Jákup á Borg | B36 | 17 |
| 2000 | VB | Súni Fríði Johannesen | B68 | 16 |
| 2001 | B36 | Helgi L. Petersen | GÍ | 19 |

## Máltindurin 2001

| | | |
|---|---|---|
| Helgi L. Petersen | GÍ | 19 |
| John Petersen | B36 | 16 |
| Fróði Benjaminsen | B68 | 13 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 12 |
| Birgir Jørgensen | VB | 12 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 11 |
| Kurt Mørkøre | KÍ | 9 |
| Krzystof Popczynski | VB | 9 |
| Jákup á Borg | B36 | 8 |
| Sorin Anghel | EB/Str. | 8 |
| Óli Hansen | GÍ | 8 |
| Allan Mørkøre | HB | 7 |
| Marek Wierzbicki | VB | 7 |
| Eli Hentze | B71 | 6 |
| Jón Sigurd Gleðisheygg | EB/Str. | 6 |
| Tór–Ingar Akselsen | FS Vágar | 6 |
| Henning Jarnskor | GÍ | 6 |
| Sámal Joensen | GÍ | 6 |
| Alexander Djordjevic | KÍ | 6 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 5 |
| Marcello Marcellino | B68 | 5 |
| Jón Rói Jacobsen | HB | 5 |
| Gunnar Mohr | HB | 5 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 5 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Robert Cieslewicz | VB | 5 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 5 |
| Kenneth Jacobsen | B36 | 4 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 4 |
| Arnold Joensen | B68 | 3 |
| Kári Reynheim | B71 | 3 |
| Birgir Joensen | FS Vágar | 3 |
| Hannus Olsen | FS Vágar | 3 |
| Bartal Eliassen | GÍ | 3 |
| Zdzislaw Janik | GÍ | 3 |
| Uni Arge | HB | 3 |
| Bárður Mortansson | HB | 3 |
| Fríðin Ziskason | KÍ | 3 |
| Ken Nónklett | NSÍ | 3 |
| Jens Kristian Hansen | B36 | 2 |
| Klæmint Matras | B36 | 2 |
| Mortan Hansen | B68 | 2 |
| Øssur Hansen | B68 | 2 |
| Jógvan Jón Petersen | B71 | 2 |
| Ronnie Samuelsen | EB/Str. | 2 |
| Sonni Johansen | FS Vágar | 2 |
| Poul Ennigarð | GÍ | 2 |
| Áslakur R. Petersen | GÍ | 2 |
| Harley Bertholdsen | KÍ | 2 |
| Ove Nysted | KÍ | 2 |
| Djóni N. Joensen | NSÍ | 2 |
| Gert Langgaard | NSÍ | 2 |
| Eddie Mikkelsen | NSÍ | 2 |
| Marner Richardt | VB | 2 |

# Tveir kappróðrarbátar afturat til Klaksvíkar

**Klaksvíkar Róðrarfelag hevur fingið eitt 5–mannafar afturat, og fyrst í komandi ári fáa teir eitt nýtt 10–mannafar**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Í summar kom Klaksvíkin aftur á føroyska kappróðrarkortið, og tað var ikki við mýkindum. Teir vunnu trý meistaraheiti – 5–mannafør gentur, 6–mannafør kvinnur og 8–mannafør.

Og nú arbeiðir Klaksvíkar Róðrarfelag fyri at skapa møguleikar fyri uppaftur fleiri sigrum og meistaraskapum.

Sambært heimasíðuna hjá felagnum – krf.fo – fáa klaksvíkingar tveir nýggjar bátar afturat.

Tað er Sámal Hansen í Runavík, sum smíðar. Hann er longu liðugur við 5–mannafarið, sum er komið til Klaksvíkar, og hann er farin undir 10–mannafarið, sum teir rokna við verður liðugt frá bátasmiðinum ikki so langt eftir ársskiftið. Norðoya Sparikassi, sum er høvuðsstuðul hjá Róðrarfelagnum, hevur goldið fyri 5–mannafarið. Einki stendur á heimasíðuni um, hvør skal rinda fyri 10–mannafarið.

Tá manningarnar í summar komu aftur av vestanstevnuni við trimum FM sigrum, var sera nógv fólk komið saman í góðveðrinum. Tá helt onkur fyri, at um teir høvdu farið runt við bússuni tað kvøldið, so hevði ikki verið langt frá, at teir høvdu fingið fyri eitt 10–mannafar!

## Rúm fyri tólv manningum

Klaksvíkar Róðrarfelag eigur eitt stórt og rúmligt neyst á Tingstøðni á Biskupsstøð, men nú fer so smátt at fyllast í neystinum.

Í fjør og í ár fekk felagið eina nýggja Fípuna Føgru, ein nýggjan Páll Fanga og eitt nýtt Nevið Reyða. Umframt hesar bátarnar vóru farmmanundan eitt 5–mannafar, sum nú eitur Snípan, og so 8–mannafarið Havrenningur. Nú fara átta kappróðrarbátar at standa í neystinum.

Um allir átta bátarnir fara at verða flotaðir og nýttir til kappróður komandi kappingarár (tað er rúm fyri ikki færri enn tólv manningum!) er ikki avgjørt enn. Gamli Klaksvíkingur luttók ikki í kappingini í ár. Tá tað royndist væl hjá hinum manningunum, varð nógv tosað um, at tað hevði verið prikkurin yvir i–num, um tað hevði eydnast at tikið lut í kappingini millum 10–mannaførini og at staðið seg væl.

Nú letur til, at teir hava ítøkiliga ætlanir um at gera dreymin til veruleika.



# Oddaliðini hava frí


Dráttur vitja um vikuskiftið í Havn, har dystur er ímóti Fleyr. Í Klaksvík spæla Mjølnir og ÍF

## Dystir og støða – kvinnur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27/10: | Fleyr-Dráttur | 13.00 | Gundadalshøllin |
| 28/10: | Mjølnir-ÍF | 17.00 | Klaksvík |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| TB | 2 | 2-0 | 6-0 | 4 |
| ÍF | 2 | 1-1 | 4-3 | 2 |
| Dráttur | 2 | 1-1 | 3-4 | 2 |
| Fleyr | 1 | 0-1 | 0-3 | 0 |
| Mjølnir | 1 | 0-1 | 0-3 | 0 |

## Dystir og støða – menn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27/10: | Fleyr-SÍ | 15.00 | Gundadalshøllin |
| 28/10: | Mjølnir-ÍF | 15.00 | Klaksvík |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fram | 2 | 2-0 | 5-3 | 4 |
| Fleyr | 1 | 1-0 | 3-0 | 2 |
| SÍ | 2 | 1-1 | 4-3 | 2 |
| Mjølnir | 1 | 0-1 | 2-3 | 0 |
| ÍF | 2 | 0-2 | 0-6 | 0 |

**Flogbóltur: Hvørki TB ella Fram spælir hetta vikuskiftið, og tí eru tað liðini undir teimum, sum nú skulu royna at fylgja við**

Bæði TB og Fram hjá ávikavist kvinnum og monnum hava frí hetta vikuskifti, og tí verða dystirnir í dag og í morgin fyrst og fremst avgerandi fyri, hvørji lið verða størstu kappingarneytarnir hjá hesum báðum í byrjanini av kappingini.

Hjá kvinnunum er tað soleiðis, at TB hevur fingið best hugsandi byrjan og hevur vunnið tveir dystir, meðan øll hini liðini longu hava tapt.

Í dag vitja føroyameistararnir úr Drátti í Havn, og um alt gongur eftir vild hjá teimum, vinna tær móti Fleyr, sum ikki sær út til at vera so sterkt í ár. Tær taptu 3-0 móti ÍF, meðan Dráttur hevur vunnið 3-1 móti ÍF, so tað skuldi verið løgið, um Dráttur ikki vinnur í dag.

Hin dysturin í bestu kvinnudeildini er í Klaksvík í morgin millum Mjølnir og ÍF. Mjølnir tapti í fyrsta umfari móti TB og hava ikki spælt síðani, so tær verða ivaleyst grammar eftir at fáa fyrstu stigini í morgin. ÍF eigur eisini at vera ein yvirkomilig uppgáva, men hava eysturoyarkvinnurnar ein góðan dag, kunnu tær hótta Mjølnir, eisini á útivølli. Men Mjølnir er favorittur undan dystinum.


Hvørki Mjølnir ella ÍF hava fingið stig í sínum dystum higartil í ár, og tí ræður um at vinna, tá liðini hittast í Klaksvík sunnudagin

## Fram fær ein granna

Hjá monnunum sleppur oddaliðið Fram undan at spæla hetta vikuskifti.

Í Gundadalshøllini verður dystur millum Fleyr og SÍ í dag. Hetta sær út til at kunna gerast ein sera spennandi dystur, tí bæði liðini hava ætlanir um at vera við í oddastríðnum í ár. Bæði Fleyr og SÍ hava longu vunnið móti ÍF, og vinnarin í dag kemur upp á sama stigatal sum Fram, sum sostatt fær ein granna á stigatalvuni. Spurningurin er bara, um tað verður Fleyr ella SÍ.

Fleyr fekk eina góða byrjan uppá kappingina við at vinna 3-0 á Kambsdali, meðan SÍ síðsta leygardag tapti móti Fram og sostatt upplivdi eitt sindur av mótgangi fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Spennandi verður at síggja, um teir so hava rist hetta tapið av sær, ella um Fleyr eins og Fram stendur við fullum stigatali aftaná tveir teir fyrstu dystirnar.

Hin dysturin hjá monnum verður í Klaksvík í morgin, og eins og hjá kvinnunum eru tað Mjølnir og ÍF, sum spæla. Hetta er so tann avgjørdi botndysturin í kappingini, tí higartil hevur hvørki av liðunum fingið stig. ÍF hevur tapt tvær ferðir og hevur enn ikki vunnið eitt sett, meðan Mjølnir tapti tepurt 2-3 móti Fram í teirra higartil einasta dysti í kappingini. Tí kundi okkurt bent á, at Mjølnir í løtuni er eitt sindur betur fyri enn ÍF.

Hvussu er og ikki, so er tað heilt vist, at taparin av hesum dystinum sum tað einasta liði stendur uttan stig sunnukvøldið, og tað er ein støða, sum hvørki av liðunum ynskir at koma í. Tí kunnu vit rokna við, at tað verður kempað hart um hvønn einasta bólt í Klaksvík í morgin.